UTTAN ÚR HEIMI

## Spara til pensión

Flestu danir leggja sera stóran dent á at tryggja sær aldurdómin fíggjarliga, og nýggj tøl benda á, at sparihugurin hevur ongantíð verið so stórur sum í ár. Sambært Børsen benda tølini á, at danir hava sett næstan 90 milliardir krónur inn á pensiónsuppsparingina í ár. Tað er 20 prosent ella 15 milliardir krónur meiri enn í 2003.

Ein orsøk til, at fólk hava sett so nógvar pengar til pensiónina í ár, er, at frívirðið í donskum sethúsum er vaksið nógv tað seinasta árið. Tað gevur húsaeigarunum møguleikar at læna pengar, og tað hava nógv gjørt og síðani sett pengarnar inn á pensiónsuppsparingina, skrivar Børsen. Tann lága rentan hevur eisini fingið mong at læna pengar til pensiónina.

Ein spurnarkanning hjá danska útvarpinum í gjár vísti, at næstan helmingurin av teimum, sum svaraðu, hava sett meiri pengar inn á pensiónsuppsparingina í ár enn í fjør.

## Børn skulu fáa bót

Í Bretlandi hevur løgreglan nú fingið heimild til at geva børnum ímillum 10 og 15 ár bót, verða tey tikin fyri drukk ella herverk. Parlamentið samtykti lógina í september, og hon kom í gildi annan jóladag.

Frammanundan hevði løgreglan heimild til at geva ungum niður í 16 ára aldur bót, vórðu tey tikin fyri drukk ella herverk, og hetta hevur víst seg at hava góða ávirkan. Tí væntar løgreglan, at tað sama fer at gera seg galdandi fyri tey 10 til 15 ára gomlu. Reglurnar siga, at løgreglan kann geva teimum ungu bót beinanvegin heldur enn at fara í rættin við teimum, men tað eru foreldrini, sum hava skyldu til at gjalda bótina. Fyrstu ferð, ein ungur verður tikin, er bótin ímillum 300 og 400 krónur.

Haxel Blears, ákæri, sigur við blaðið The Guardian, at tað finnast dømi um ung ímillum 10 og 15 ár, sum oyileggja ognir hjá øðrum, og sum órógva heil grannaløg. Men nú skal endi fáast á hesum, sigur hon.

## Vónsvikin bróður

Tá týski kanslarin, Gerhard Schrøder, fylti 60 fyri átta mánaðum síðani, var yngri bróður hansara, Lothar Vosseler, ikki boðin í føðingardag.

Kanska iðrar kanslarin seg um tað í dag, tí herfyri gav Lothar Vosseler út eina bók, sum fer illa við bróðurinum og politikki hansara. Hann fer serliga illa við arbeiðsmarknaðarpolitikkinum hjá kanslaranum og sigur, at hesin politikkurin ger tað truplari hjá teimum frammanundan ringast støddu í Týsklandi.

Tey, sum hava lisið ta nýggju bókina, siga kortini, at hon gevur eina góða mynd av tí sera trupla uppvøkstrinum hjá kanslaranum og systkinum hansara aftan á seinna heimsbardaga. Pápi Gerhard fall sum týskur hermaður í Rumenia í 1943. Mamman giftist uppaftur, men tann seinni maðurin doyði stutt eftir, so hon var einsamøll um tey fimm børnini. Hetta var ein sera trupul tíð, og tað er sagt, at mamman er tann stóra fyrimyndin hjá kanslaranum.

## Beit oyrað av skipsfelaga

Tað er ikki bara Mike Tyson, sum kann finna uppá at bíta oyrað av sínum mótstøðumanni.

Jólakvøld høvdu tveir írskir sjómenn, sum lógu ikki í Tromsø í Noregi, fingið í so nógv upp í høvdið. Tað endaði við bardaga, og undir bardaganum gjørdi annar ikki mætari enn at bíta eitt petti av øðrum oyranum hjá hinum. Tað eydnaðist teimum boðsendu norsku hjálparfólkunum at finna pettið, sum bleiv seymað áaftur.

Nordlys skrivar, at írska skipið verður liggjandi í Tromsø nakrar dagar, meðan løgreglan kannar málið.



*Hesin maðurin í India situr í tí, sum er eftir av húsum hansara. Fleiri millónir fólk í teimum raktu økjunum eru eins og hann vorðin heimleys*

# Skjálvtin var sum 10.000 Hiroshimabumbur

**Vandi er fyri, at flóðaldan í Suðurasia hevur kravt heili 60.000 mannalív, og fleiri milliónir eru vorðin heimleys. Fleiri norðurlendingar eru ímillum tey deyðu**

FLÓÐALDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er ikki óhugsandi, at umleið 60.000 fólk lótu lív, tá tann stóra flóðaldan skolaði inn yvir strendurnar í londunum í Suðurasia og Eysturafrika annan jóladag. Alment var talið á deyðum komið upp um 28.000 í gjár, men tíðindi úr India bendu á, at tað endaliga talið kanska verður tvær ferðir so stórt.

Ein talsmaður hjá indisku myndugleikunum segði, at umleið 30.000 fólk á tveimum oyggjum eru ikki komin afturíaftur aftan á flóðalduna. Fimm bygdir á oyggjunum Nikobar og Andaman vórðu heilt einfalt skolaðar burtur, segði talsmaðurin.

Sambært teimum almennu tølunum higartil er Sri Lanka ringast rakt. Har hava myndugleikarnir staðfest, at meiri enn 11.000 fólk eru deyð. Í India er talð farið upp um 7.000, og í Indonesia bera myndugleikarnir ótta fyri, at talið har er uppaftur nógv størri. Jusuf Kalla, varaforseti, segði í gjár, at bara í landspartinum Banda Aceh kunnu upp ímóti 10.000 hava latið lív. Í Teilandi søgdu myndugleikarnir í gjár, at minst 868 fólk eru deyð, men at meiri enn 6.000 eru ikki komin afturíaftur.

Bjargingarlið hava havt ilt við at koma neyðstøddum til hjálpar.Vegir og jarnbreytir eru skolað burtur, og telefonsambandið er farið nógvastaðni. Tí vita myndugleikarnir í fleiri av londunum ikki, hvussu støðan er.

Flóðaldan var so ógvuslig, at í Somalia, sum er 5.000 kilometrar frá jarðskjálvtamiðdeplinum. Har doyðu fleiri hundrað fólk, og fleiri bygdir fram við strondini eru javnaðar við jørðina.

### Fleiri norðurlendingar

Nógv norðurlendsk ferðafólk vóru í londunum í Suðurasia, tá flóðaldan skolaði inn yvir tað lága lendið, og fleiri teirra lótu lív.

Í gjár visti danska uttanríkisráðið at siga, at minst tríggir danir eru deyðir, men at myndugleikarnir bera ótta fyri, at tíggju aðrir hava latið lív. Úr Teilandi varð sagt, at har leitaðu myndugleikarnir eftir umleið 200 dønum, sum eingin hevði frætt frá síðani flóðalduna.

Norska uttanríkisráðið segði í gjár, at minst trettan norðmenn eru deyðir, og at leitað verður eftir fleiri øðrum. Svensku myndugleikarnir vistu í gjár um níggju sviar, sum eru deyðir, men at leitað verður eftir umleið 140 svenskum ferðafólkum. Minst ein finnlendingur er deyður, siga myndugleikarnir í Helsinki.

### Sum 10.000 Hiroshima-bumbur

Jarðfrøðingar siga, at vanliga eru slíkir jarðskjálvtar sum tann annan jóladag einar 700 kilometrar undir havbotninum, men at hesin var væl ovari enn so. Skjálvtin gjørdi, at havbotnurin hækkaði tíggju metrar, og tað elvdi til ta stóru flóðalduna, sum var umleið 1.000 kilometrar breið og ferðaðist einar 700 kilometrar um tíman, sigur Erik Schou Jensen á Gerologisk Museum í Danmark við Politiken.

Hann leggur afturat, at megin í sjálvum skjálvtanum og flóðalduni svaraði til einar 10.000 kjarnorkubumbur av tí slagnum, sum amerikanarar sleptu niður yvir Hiroshima í 1945.

Danski jarðfrøðingurin sigur, at tað fara at koma eftirskjálvtar á leiðini, men at teir fara ikki at elva til so ógvusligar flóðaldur sum skjálvtin annan jóladag.